## VIÐMERKINGAR

# Grundstøðið undir einum framkomnum Føroyum

**Johan Dahl**
*løgtingsmaður*



Vita hava brúk fyri vitanarvinnum (nýggjum vinnum)

Vit hava brúk fyri útbúgvingum - til at mennað okkara samfelag

Vit hava brúk fyri mentanini, okkara samleika. Hon kann gera okkum kend og partar av henni enda sum vinna.

Vit hava so sanniliga eisini brúk fyri í nógv størri mun enn nú, at samantvinna hesi, so vit fáa eina størri eind burturúr.

**Útbúgvingar á samlibandi, universitetsgradir í stóran stíl og hvat so??**

Vit hava í mong ár útbúgvið okkara ungu, so tey í vitanarhøpi eru í heimsklassa.

Vit hava - við atliti til fólkatalið, heimsins best útbúna fólk, men vit hava tey tíverri ikki her heima hjá okkum í tann mun vit áttu.

Hyggja vit eftir, hvat tað er sum veruliga er í gongd, so haldi eg at tað er ikki sørt skelkandi.

Vit brúka í hundraðvís av milliónum til útbugvingar av fólki - tað skulu vit eisini, tí eitt høgt útbúgvingarstøði er lykilin til eitt framtíðar sterkt samfelag, sum kann koma at klára seg, og kanksa verða í fremstu røð í so nógv umrøddu altjóðagerðini, sum fer fram rundanum okkum, hetta um vit dugað at gagnnýta okkara resoursir - eisini heilaresursir.

Tað skelkandi er, at **VIT DUGA IKKI AT FÀA TEY HEIMA AFTUR** at virkað, og verða við til at mennað og byggja okkara land upp, til tað vitanarsamfelag, sum vit so sterkt hava brúk fyri, fyri at yvirlivað framyvir. Vit hava í hundrað talið av **sera væl-útbúnum fólki innan alskyns yrkisgreinar, sum sita í topleiðara og millumleiðara størvum í útlandinum.**

**Vit hava fólk í leiðslunum á útlendskum virkum, innan granskingarætlanir, medisinframleiðslu, matvøruframleiðslu, innan tónleikavinnu, innan sniðger/design á høgum støði, innan bankavirksemið/fíggingarvirksemið, innan telecommunikatión, innan tungframleiðslu osfr. Vit hava serlæknar av ymsum slag, farmaseutar, biologar, kemikarar, bromatologar osfr. osfr., sum vit kanska ongantíð síggja her heima aftur, uttan í ferium, tí vit kunnu ikki bjóða teimum størv.**

Vit hava Búskaparfrøðingar, Samfelagsfrøðingar, Fíggjarfrøðingar, Grannskoðarar, og nógvar aðrar frøðingar, sum vit heldur ikki síggja aftur.

Vit eiga at gera alt sum stendur í okkara makt fyri at fáa hesi hendanvegin aftur, tí vit hava sum ongantíð fyrr brúk fyri hesum fólkum og teirra vitan og royndum.

**STØÐAN Á HEIMAVØLLINUM**

Tað **syrgiliga** sum hent er, er at **vit hava** fingið nøkur av hesum fólkum heim, men hvar eru tey?? Hvar eru tey fólkini sum áttu at verið úti í vinnuni og verið við til at ment og bygt samfelagið upp?? Jú tíverri, so hava vit sett tey flestu í størv innan okkara almennu fyrisiting.

Har sita tey trygt og gott við einari góðari løn, góðari pensión og einum eftir teirra metan tryggum lívsstarvi.

Eg haldi ikki at tað skal verða so. Eg haldi at ein munagóður partur av hesum fólkum við stórari vitan áttu at verið í vinnuligum virksemið.

Tað kann ikki verða rætt, at tann sum rindar tær bestu lønirnar, - frammum grannskoðarar, vinnuvirkir, bankar og arðar, er tað almenna. Tá eru vit farin á eitt skeivt sport samfelagsliga, tí eitt er vist: Vit livað ikki leingi av at klippað hvørjum øðrum. Vit liva heldur ikki av at lata eyguni aftur og lata standa til og siga at alt er so sára gott - TÍ TAÐ ER TAÐ ALS IKKI.

**INNTØKUVØKSTURIN VANTAR**

Vit komað einans at liva væl við at skapa støðugan inntøkuvøkstur burtur úr vinnuligum virksemi, handilsligum virksemi, sølu av vitan, framleiðslu av einhvørjum slag, tað verði seg á sjógvi og landi.

Vit mugu byrja at takð í egnan barm og broyta okkara vinnuliga hugburð. Fiskivinnan og fiskaframleiðslan fyllir nógv og er enn grundvøllurin undir okkara samfelag, men vit mugu eisini byrja at brynja okkum til framtíðina og fáa vitanartungar vinnur henda vegin.

Vit mugu byrja innanifrá við fyrst og fremst at hava ein vinnupolitikk. Tað hava vit tíveri ikki havt í mong ár. Tí liggja vit sum vit liggja ídag.

Vit mugu gera Føroyar til eitt komandi KOMPETANCU LAND, sum ikki longur kemur at detta burturímillum í einum altjóðagjørdum, vitanarbaseraðum heimi.

Vit mugu gera eina ætlan, sum førir við sær, at tað verður áhugavert at koma til Føroya at vinna og virka.

Áhugaverd tilboð til nýhugsandi føringar og útlendingar, innovativ virkir, væl lærd fólk, og útlendskur kapitalur eru neyðug. Vit eiga eisini at seta á stovn ein Vakstrargunn, sum hevur sama endamál sum t.d. tann danski vækstfonden (www.vf.dk). Peningur til ein slíkan grunn kunnu vit fáa við at selja út av okkara almennu feløgum - einskilja ALT sum er á almennum hondum av vinnuvirkjum eftir føstum leisti.

Vision 2015 ljóðar væl. Vit mugu seta fer á ætlanina at fáa VISIÓN 2015 til at gerast veruleika, við ítøkiligum málrættaðum verkætlanum - kanska einum 4-5 spjaddar yvir landið at byrja við.

**Okkara aðalmál eigur at verða :**

Lat okkum fáa teir væl-lærdu "heilarnar" heimaftur sum eru uttanfyri landoddarnir.

Lat okkum fáa teirra vitan og royndir heim, so vit fáa nyttu burturúr hesi, øllum samfelagnum at gagni og føroya fólkið til framburðs.

---

*Framhald av síðu 10*

við góðum, tryggum almennum starvi niðurgera høvuðsvinnu okkara, og lata sum um, at vit longu hava fingið nýggjar vinnur. — Lat okkum fyrst fáa hesar vinnur at virka, áðrenn vit niður- og tileinkisgera okkara núverandi høvuðsvinnu.

Vanliga gerst ein ikki stórur tónlistamaður bert við at læra nótar. Soleiðis gerast fólk ikki náttúrliga góðir praktiskir leiðarar og leiðbeinarar, bert við eini bókligari útbúgving og fáum royndum. Her skal naka meira til.

**Sentralisering á eitt øki, ger av við dynamikkin**

Seinastu árini er almenna virksemið sentraliserað til høvuðsstaðin. Hetta hevur lækkað dynamikkin sum heild. Orsøkin til tað er, at her verður eingin kapping, eins og í londunum uttan um okkum, har sentraliseringa fer til kanska eini fimm, tíggju ella øki.

Bæði embætisfólk og sentraliserandi politikarar eru farnir skeivir, meðan økini úti um landið líkasæl hava hugt at.

**Órealistiskir droymarar og skapandi hugsjónarfólk**

Fyri árum síðani las eg áhugaverda bók, sum amerikansku fyrilestrarhaldararnir Craig R. Hickman & Michael A. Silva skrivaðu, "Creating Exellence — Managing Corporate Culture, Strategy and Change in the New Age" á donskum hevur hon heitið "Den dynamiske virksomhed", har teir m.a. viðgera munin á "órealistiskum droymarum" og "skapandi hugsjónarfólkum", sum mong halda vera eitt og hitt sama.

Hetta er ein góð sammeting við Tjóðveldisflokkin, Kristinu Háfoss og øll, sum á ein ella annan hátt fara illa við okkara høvuðsvinnu, og sum meta hana sum byrði fyri samfelagið.

Vit eiga ikki longur at finna okkum í, at skapandi vinnulívsfólk verða kallað "kraddarar, profitmakarar o.s.fr." av órealistiskum droymarum, eitt vinnulív, sum bæði hevur hildið útjaðarøkinum og høvuðsstaðnum á lívi saman við øllum tí vaksandi almenna yvirbygninginum.

Latið okkum taka væl ímóti fram- og fyritøkum uttan um fiskivinnuna, sum sjálvsagt mugu koma, uttan at høvuðsvinnan verður niðurgjørd.

---

# Grundlóg ella Stjórnaskipan?

**Michael Feldballe**

Er der egentlig forskel på en Grundlóg og en Stjórnarskipan? Efter at have læst det forslag om at ændre i loven for grundlovsnævnet, som i øjeblikket er under behandling i lagtinget, var det nødvendigt med en færøsk definition af begge begreber. I Føroysk Orðabók, der udkom i 1998 står om ordet Grundlóg, at det betegner en "lov om de grundlæggende bestemmelser for ledelsesstrukturen (stýrisskipanina) i et land". Om begrebet Stjórnarskipan står at det er "almenregler for ledelse (stjórn) og struktur (skipan) for et rige". Det vil sige "måder eller traditioner et samfund bliver styret efter".

Skal man tage ovenstående begreber bogstaveligt, så ønsker man med ændringsforslaget ikke en lov om de grundlæggende bestemmelser for almenregler for ledelse og struktur på Færøerne. Derimod ønsker man sig kun almenregler for ledelse og struktur for (bemærk: riget!) Færøerne.

Med den nuværende koalition i førertrøjen, er det jo næppe ordbogens definitioner af Grundlóg for et land og en Stjórnarskipan for et rige der har været i fokus. I stedet er det, det politiske forum som grundlovsnævnet blev nedsat i, der skaber årsagen til, at man vil kalde det eksisterende for noget andet. Selvom det ret beset er indholdet og ikke udformningen der er afgørende.

Her på Færøerne har begrebet grundlov en særlig betydning. Og det står for noget som alle vist kan være enige om, er blevet pålagt dette land. Nuvel, det kan man jo ikke lave om på – sket er sket. Også hvis man med tiden måtte beklage det. Men det bør ikke forhindre det gode og fornuftige arbejde, der ligger i at skabe en grundlov. Væsentligst af alt, må der for det færøske samfund være et lovgrundlag, der kan retlede efter færøske forhold og ikke efter danske forhold. En lang række statslige funktioner er overtaget jævnfør Hjemmestyreloven, men der forefindes ikke en grundlæggende lov for hvorledes man skal bygge efter færøske traditioner og særegne færøske forhold. Derfor er indholdet af en grundlæggende færøske lov vigtig for dette samfund, uanset den betegnelse for loven man måtte beslutte sig for.

Det er vigtigt for det færøske samfund at danne sig et grundigt fundament for færøske samfundforhold og fortolkningen af de love der måtte gælde for Færøerne. Lad os for eksempel antage at der inden for en kort årrække sker en ændring af den danske Grundlog. Hvis en hovedårsag til ændringen er en ligestilling af tronarvingen, er det ikke utænkeligt at denne ligestilling også vil slå igennem vedrørende andre menneskerettigheder. Vil man i en sådan situation, her på Færøerne acceptere at homoseksualitet, vielse af homoseksuelle og retten til abort bliver dele af en ny grundlov, fordi det danske samfund har ændret sig radikalt siden 1953? Vil det, i dette for ovenstående temaer stærkt taburiserede samfund, skabe et problem at have en Grundlov der giver disse rettigheder?

Hvorfor ikke komme i gang med, at se indholdet af en færøsk grundlov nærmere an, i stedet for at politisere over lovens betegnelse, og komme videre med det store arbejde der allerede er foregået.

---

# Rætting og ískoyti

Í Tinghellugreinini hjá Finnboga Ísakson í blaðnum í gjár "Um at boykotta løgtingsarbeiðið og skrumbla stórmál ígjøgnum" vóru nakrar kelduávísingar dotnar burtur.

Til partarnar "Dahlerupmálið" og "Sterlingrokið" hevði hann nýtt hesar keldur:

Hans Jacob Debes: Nú er tann stundin, s. 95-99

Sigfried Skaale: Pf. Sjóvinnubankin 1932-1972, s. 42-43

Annfinnur í Skála: Stjórnarskipanarmálið 1946, s. 37-38

Tað verður við hesum rættað.